# RAKSTRARREGLUR FYRI SAMKOMUHÚS O.T.

Brunaumsjón landsins

Desember 1998

Rakstrarreglur fyri samkomuhús o.t.

Hesar ásetingar eru settar við heimild í § 22 í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 og fevna um bygningar og høli, har nógv fólk koma saman.

1 Greiningar

1.1 Samkomuhøli o.t.: Leikhús, høli til framsýningar, fundir og skemtunarendamál, ítróttarhallir, matstovur, veitsluhøli, kirkjur og onnur høli og bygningar nýtt til tílík endamál, støðugt ella av og á.

Tvey ella fleiri samkomuhøli við felags rýmingarleiðum ella, sum brunaliga hava samband hvørt við annað, verða roknað, sum eru tey eitt høli.

2 Alment

2.1 Tann, ið hevur dagligu ábyrgdina, hevur eisini ábyrgdina av, at hesar rakstrarreglur verða hildnar.

2.2 Brunamyndugleikarnir kunnu í serstøkum førum áseta herðingar ella slakingar í sambandi við tiltøk, har umstøðurnar hava við sær meira ella minni brunavanda, so fólkatrygdin er í vanda, og har stór virði kunnu verða hótt av oyðing. Alment tilgongd samkomuhøli skulu gerast og haldast við fyriliti fyri tryggleika hjá eldri fólki, sjónveikum og rørslutarnaðum.

2.3 Við atliti til samkomuhøli til fleiri enn 50 fólk eru serliga punktini 6.1, 6.2 galdandi.

3. ÚT- og neyðljós

3.1 Í samkomuhølum, har ÚT- og neyðljós eru, skal, meðan hølini eri í nýtslu, vera fólk til staðar, ið hevur fullan kunnleika um inleggingina og hvussu hon verður handfarin, viðlíkahildin og roynd..

3.2 Næst stýritalvum fyri ÚT- og neyðljósum skal vera uppsligið ein vegleiðing, ið nágreiniliga greiðir frá skipanini, hvussu hon virkar, hvussu hon skal brúkast, og hvussu hon skal roynast og haldast við líka.

3.3 Sí punktini 6.2.7, 6.2.8, 7.1, og 7.4.

4 Leikpallar

4.1 Fyribils uppsettir leikpallar.

4.1.1 Gólvvíddin á leikpalli má ikki vera størri enn 35 m². Sí tó punkt 4.2.7.

4.1.2 Pallar skulu setast soleiðis, at tað ikki forðar fólki at sleppa til útgongdir og neyðútgongdir.

4.1.3 Brunamyndugleikarnir skulu, í sambandi við bjargingarop og rýmingarleiðir, góðkenna nýtslu av hølum til umklæðingarrúm og onnur tílík rúm.

4.1.4 El-innleggingar skulu vera gjørdar av góðkendum el-innleggjarum.

4.2 Nýtsla av føstum og fyribils pallum.

4.2.1 Nýtsla av pallum, sum ikki hava serstaka góðkenning frammanundan, skal fráboðast kommunalu brunamyndugleikunum í minsta lagi 3 dagar frammanundan.

4.2.2 Leiktjøld og tílík tjøld skulu vera úr ull ella verða brandimpregnerað.
Tjalddúkarnir skulu vera úr tilfari, sum tekur við impregneringini.

4.2.3 Tjalddúkar, úr øðrum tilfari enn tey, ið eru nevnd undir punkti 4.2.2, og kulissur, prýði o.t. skal gerast úr

a) tilfari, sum ikki kann brenna, ella tilfari, sum ikki lætt kann brenna, t.d. gipsplátu, krossviði, harðari træplátu, spønplátu o.t. - ella

b) pappíri, hessian ella tílíkum tilfari, ið er brandimpregnerað.

c) Tilfar, ið sipað er til undir b), skal viðgerast eina ferð hvørt ár, tað er í nýtslu.

4.2.4 Opin eldur, livandi ljós ella tílíkt má ikki nýtast uttan eftir serstøkum loyvi og treytum frá brunamyndugleikunum.

4.2.5 Brunamyndugleikarnir kunnu seta forboð fyri tubbaksroyking á palli, í hølum næst palli og í umklæðingarrúmum.

4.2.6 Rúm undir pallum skulu vera rein og ruddilig.

4.2.7 Brunamyndugleikarnir kunnu geva frávik í punktunum 4.1.1, 4.2.2, 4.2.3 og 4.2.4., um so er, at umstøðurnar á staðnum annars kunnu roknast at vera forsvarligar, t.d. tá ið talan er um sprinklað øki, ella at har eru aðrar herdar ásetingar, eitt nú støðug brandvakt.

4.3 Brandvakt.

4.3.1 Brunamyndugleikarnir kunnu krevja, at brandvakt verður sett í samband við leikpallar í hølum:

a) til fleiri enn 300 fólk við fyribils pallum,

b) til fleiri enn 500 fólk við føstum pallum,

c) við palli, sum hevur størri gólvvídd enn 100 m², og hølum

d) við togskipan at hiva og umbýta kulissum o.t.

Brunamyndugleikarnir áseta í hvørjum einstøkum føri setningin hjá brandvaktini.

4.3.2 Í serligum førum, har viðurskiftini á staðnum tala fyri tí, kunnu brunamyndugleikarnir krevja, at eisini í minni hølum við pallum skal brandvakt verða sett.

4.3.3 Útreiðslur fyri brandvakt skal fyrireikarin (loyvishavarin av tiltakinum) rinda eftir taksti, sum bý- ella bygdaráðið hevur ásett sambært § 22 stk. 2 í brunalógini.

5 Sløkkiútbúnaður

5.1 Í samkomuhølum skal á høgligum stað vera slanguskáp, ið er sett til vatnkervið eins og ásett í 23.2.-4 í KBB 99 og samb. punkt 5.9.

5.2 Slanguskáp skulu vera sett soleiðis, at tað frá tilvildarligum stað ikki er longri enn 25 m til næsta skáp.

5.3 Sløkkiútbúnaður skal setast næst atkomuvegnum í brunadeildini og soleiðis, at tað ikki minkar um breiddina ella á annan hátt forðar í rýmingarleiðini.

5.4 Í køkum til veruliga matgerð skal næst útgongdini vera í minsta lagi 1 hondeldsløkkjari, eins og lýst í punkti 5.10. Umframt skal eitt sløkkiteppi vera hongt á veggin. Har friturekókari ella tílíkt er, skal eitt sløkkiteppi vera.

5.5 Har fastir leikpallar eru, skal á lætt tilgongdum stað vera slanguskáp eins og tað, ið er tilskilað í punkti 5.9. Brunamyndugleikarnir kunnu tó krevja 1"-slangu (størri sløkkiorku) í samkomuhølum við palli, størri enn 100 m², ið hevur tog-og lyftiskipan til kulissurnar yvir pallinum.

5.6 Næst brandvaktini á føstum- og fyribilspallum skal vera ein hondeldsløkkjari og eitt sløkkiteppi (1 m x 2 m).

5.7 Brunamyndugleikarnir kunnu krevja eyka sløkkiútgerð, eins og tilskilað í punkti 5.10, í umklæðingarrúmum, verkstaðarhølum og hølum, ið kunnu elva til eldvanda og spjaðing av eldi.

5.8 Uppheingingarstað til sløkkiútgerð skal vera merkt eftir DS 734.

5.9 Slanguskáp við slangu, sum vatn altíð er til, skal geva 20 l/min. og kunna spræna ikki minni enn 9 m. Vatnveitingin skal vera nøktandi til at 2 slanguskáp kunnu vera í nýtslu í senn.

5.10 Hondeldsløkkjarar skulu vera í minsta lagi 6 kg $CO^2$- ella pulvursløkkjarar av góðkendum slag samb. DS 2120. CO2-sløkkjarar skulu vera av slagnum "typa 55 B". Pulvursløkkjarar skulu vera av slagnum "typa 89 B". Hondsløkkiútbúnaður skal hanga í høgligari hædd yvir gólvi.

5.11 Víst verður til punktini 2.2, 6.6.2 f, 7.2, 7.3 og 7.5.

## 6 Rakstrarreglur

### 6.1 Alment.

6.1.1 Øki, sum neyðug eru til akførini hjá sløkkiliðnum at koma sær fram at bygningum, mugu ikki brúkast til at seta frá sær bilar ella annað, ið kann forða sløkkiliðnum at sløkkja ella at bjarga fólki út.

6.1.2 Rúm til luftnýggjunarútbúnað, telefontalvurúm (krossfelt), neyðstreymsmotorar og teknikrúm annars mugu ikki nýtast til goymslu av nøkrum slag.

### 6.2 Rýmingarleiðir.

6.2.1 Tað mesta av fólki, ið kann vera í einum samkomuhøli í senn, skal svara til ta samlaðu víddina á rýmingarleiðunum og/ella víddina á hurðaopunum, mált, har hesi eru smalast. Roknast skal 1 persónur fyri hvønn cm av breiddini í rýmingarleiðini.

6.2.2 Í samkomuhøli til fleiri enn 50 fólk skulu vera í minsta lagi 2 útgongdir heilt fyri seg út/niður á lendi. Útgongd og neyðútgongd skal vera hvør sínumegin í hølinum.

6.2.3 Hurðar millum samkomuhøli til fleiri enn 150 fólk og rýmingarleiðir skulu lata upp út í rýmingarleiðina. Hurðaropið skal vera í minsta lagi 1 m breitt og 2 m høgt. Hurðar, sum ikki hava til endamáls at forða eldi og royki at breiða seg (úthurðar), kunnu vera sjálvupplatandi skjótihurðar, um tær eru gjørdar soleiðis, at tær eisini lata seg sjálvar heilt upp, tá ið streymslit er, ella tá ið trýst verðar á neyðupplatingarknøttin.

6.2.4 Í gong, trappu, túni o.t. skal vera ruddiligt, og hesi pláss ella høli skulu ótarnað hava fulla breidd. Í sambandi við samkomuhøli til fleiri enn 150 fólk skal vera neyðljósskipan, soleiðis at fólk á tryggan hátt sleppa burtur frá bygninginum og økinum. Í rýmingarleiðum mugu ikki vera nakrar forðingar fyri at eldri fólk, sjónveik ella rørslutarnað sleppa út.

Innbúgv ella annað má als ikki setast í rýmingarleiðirnar. Brunamyndugleikarnir kunnu tó, eftir umsókn, loyva, at gongir og tún (ikki trappurúm) verða nýtt til onnur endamál enn ferðsluveg til neyðrýmingar, um so er, at tað ikki tarnar endamálinum sum rýmingarleið.

Bilar ella súkklur mugu ikki setast uttanfyri í rýmingarleiðini. Har má heldur ikki plantast ella nakað setast, sum forðar í rýmingarleiðini.

Uttandura rýmingarleiðir skulu vera ruddaðar fyri kava og gler.

6.2.5 Fólk skulu altíð kunna fara út um hurðar, sum eru rýmingarleiðir, uttan at nýta lykil ella nakað amboð. Hurðarnar skulu vera léttar at lata upp við berum hondum við at snara ella toga í eitt handfang. Handfang skulu vera uml. 1 m yvir gólvinum. Pasquilbeslag skal vera 1,6

m yvir gólvinum. Á alment tilgongdum støðum (eisini fyri brekað) mugu handfang á hurðum í rýmingarleiðum ikki fjalast ella verjast við plastikkoppum o.t.

6.2.6 Hurðar í rýmingarleiðum, sum ikki verða brúktar dagliga, skulu merkjast NEYÐÚTGONGD eftir DS 734.

6.2.7 Neyðhurðar og rýmingarleiðir mugu IKKI fjalast við gardinum ella á nakran annan hátt gerast ógreiðar. Somuleiðis skulu ÚT-ljósskeltini altíð vera sjónlig, og tey mugu ikki fjalast á nakran hátt.

6.2.8 ÚT-ljósskipanin í samkomuhølum og tilhoyrandi rýmingarleiðum skal altíð vera tendrað, meðan hølini eru í nýtslu.

6.3 Brandhurðar.

6.3.1 Hurðar millum trappur og gongir og annars allar sjálvafturlatandi hurðar skulu altíð standa afturlatnar, og tær mugu ikki haldast opnar við kílum, snøri, krókum ella nøkrum, sum forðar teimum at lata aftur. Sí tó punkt 6.3.2. Tann sjálvafturlatandi skipanin, hurðapumpa o.t. má ikki gerast óvirkin.

6.3.2 Hóast ásetingarnar í punkt 6.3.1, kunnu sjálvafturlatandi hurðar haldast opnar av elektromagnetum, sum eru stýrd av roykvarnarum, sum eru settir upp báðu megin hurðaropið. Roykvarnarar og tilhoyrandi útgerð skal vera góðkend av Brunaumsjón landsins.

6.3.3 Um brunamyndugleikarnir í sambandi við eftirlit koma fram á, at hurðar verða hildnar opnar í ósamsvari við punkt 6.3.2, skal verða kravt, at hurðin verður jørd sum ásett í punkti 6.3.1.

6.3.4 Brunamyndugleikarnir kunnu krevja, at brandhurðar verða merktar:

BRANDHURÐ - SKAL VERA AFTURLATIN. Merkingin skal vera eftir DS 734.

6.4 <u>Innbúgv.</u>

6.4.1 Uppstilling av borðum, stólum og øðrum í samkomuhølum skal gerast eftir einum yvirliti, sum brunamyndugleikarnir kunnu góðtaka. Uppstillingaryvirlitið skal vísa borð- og ella stólauppstilling og skal til fulnar vísa rýmingarleiðirnar heilt út í tún. Verða fleiri ymisk tílík yvirlit gjørd, skulu tey hvørt sær góðkennast. Tílík uppstillingaryvirlit skulu hava áteknaða góðkenning frá brunamyndugleikunum, og tey skulu hanga á vegginum á einum lætt tilgongdum stað, har viðskiftafólk hava møguleika at síggja tey.

Í hølum og bygningum, sum av og á verða nýttir til samkomuendamál, skulu somuleiðis vera haldgóð uppsløg á sjónskum stað.

Umframt uppslag um borð- og stólauppstilling og rýmingarleiðir skal eisini vera skilligt og haldgott uppslag á sjónskum stað, ið vísir mest loyvda fólkatal, sum brunamyndugleikarnir loyva at vera inni í senn, samb. punkti 6.2.1.

Uppsløg um mest loyvda fólkatal kunnu til dømis orðast soleiðis:

6.4.2 Stólarøð skulu festast í gólvið ella krøkjast saman fyri í minsta lagi hvørjar 4 og 4 stólar. Samanbundnir stólar skulu vera festir soleiðis, at teir verða hildnir saman, meðan teir eru í nýtslu. Fráleikin máldur frá stólaryggi til stólarygg skal vera í minsta lagi 80 cm. Hvørt stólasetur skal vera í minsta lagi 50 cm breitt.

Talið av sessum í sama stólarað fram til opið gonguøki (130 cm breitt) skal í mesta lagi vera 12. Millum gonguøki (130 cm breið, har stólarnir eru festir í gólvið og 200 cm breið við samankrøktum stólum) skulu í mesta lagi vera 20 stólarøð. Nevndu gonguøkini skulu tó vera í minsta lagi 1 cm breið, roknað fyri hvørt fólkið, sum skal fara um ta ávísu leiðina fyri at koma til úthurðarnar/gongirnar út úr samkomuhølinum.

6.4.3 Borð- og stólauppstilling, t.d. í matstovum, skal geva pláss til 130 cm breitt gonguøki. Tílík gonguøki skulu tó vera í minsta lagi 1 cm breið roknað fyri hvørt fólki, sum skal fara ta ávísu leiðina fyri at koma fram til úthurðarnar/gongirnar út úr hølinum.

6.4.4 Borð, stólar og annað innbúgv má ikki verða sett ella nýtt soleiðis, at tað forðar fyri at nýta rýmingarleiðirnar.

6.4.5 Stólaklæði skal vera úr ull ella úr tilfari, sum er brandimpregnerað ella sum ikki lætt kann brenna.

6.5 Starvsfólkafyriskipan.

6.5.1 Starvsfólk skulu hava fullan kunnleika til vegleiðingar, rakstrarreglur og nýtslu av sløkkiamboðum.

6.5.2 Starvsfólk skulu hava fullan kunnleika um fráboðanar- og ávaringarhættir í sambandi við eldsbruna o.t. Starvsfólk skulu vera før fyri at vegleiða og skipa fyri, um fólk skulu flytast burtur (evakuerast).

6.5.3 Starvsfólk (duravørðar) skulu halda tal á, hvussu nógv fólk eru inni í bygninginum og/ella samkomuhølum í einum bygningi.

6.6 Pynt í bygningum og serlig tiltøk.

6.6.1 Serliga prýdd samkomuhøli og serlig tiltøk (framsýningar, basarar, sølustevnur o.t) mugu einans vera, um loyvi í hvørjum einstakum føri er fingið frá brunamyndugleikunum.

6.6.2 Tá ið jólatrø verða sett upp í samkomuhølum er galdandi:

Træið skal ikki forða fyri í rýmingarleiðunum.

Træið skal standa trygt í fótinum og skal annars ikki lætt kunna koppa.

Pappírsprýði skal nýtast sum minst. Eldfimt prýði, sum vatt o.l, sum eldur lætt festur í, má ikki brúkast.

Tað skulu ikki vera livandi ljós (kertuljós) á trænum.

Jólatrø mugu ikki standa inni longur enn í 14 dagar.

Í hølinum ella næst jólatræi skal vera hondsløkkiamboð.

Punkt f. er ikki galdandi fyri heilt smá trøð, sum einans eru til prýði.

6.6.3 Viðvíkjandi framsýningum, basarum, sølustevnum o.t. er galdandi:

Borð, stólar, prýði og innbúgv annars skal setast soleiðis, at tað ikki forðar fyri í rýmingarleiðunum.

Prýði ella innrættingar til básar til framsýning o.t. má ikki vera úr plastfolio, skúmplasti (flamingo) ella tílíkum eldfimum tilfari. Brandimpregnerað tilfar úr t.d. pappíri, hessian og lørifti kann nýtast.

Innballingartilfar, t.d. pappdósir, træull, pappír og plastikk, má ikki verða sett í samkomuhølið ella í rýmingarleiðunum.

Tubbaksroyking er ikki loyvd uttan við loyvi frá brunamyndugleikunum.

El-installatiónir, verandi ella fyribils, skulu gerast av góðkendum el-innleggjara.

6.6.4 Umframt ásetingarnar í 6.6.2 og 6.6.3 kunnu brunamyndugleikarnir seta onnur og herðandi krøv, eitt nú um brunavakt, í teimum førum, tað verður hildið neyðugt.

7 Eftirlit

7.1 Fjórða hvørt ár skal ein váttan, gjørd av góðkendum el-innleggjara, sendast brunamyndugleikunum um:

a) Út- og neyðljósskipanin lýkur galdandi krøv, og nøktandi neyðljós eru í samkomuhølinum og rýmingarleiðunum,

b) roykvarnaraskipan til at stýra afturlating av hurðum er í lagi og virkar og

c) el-installatiónirnar í sambandi við pallar (orkesturpláss) eru í fyriskrivaðum standi og um tær virka.

7.2 Brandslangur í slanguskápum skulu eftirhyggjast og roynast í minsta lagi eina ferð um árið.

7.3 Hondeldsløkkjarar, nevndir í punkt 5.4, 5.7 og 6.6.1 f, skulu eftirhyggjast í minsta lagi eina ferð um árið (Manometur, forsegling o.t). Pulvursløkkjarar skulu trýstroynast og kannast gjølla 5. hvørt ár. Á eldsløkkjarum skal vera spjaldur, ið vísir seinasta eftirlitsdag og -ár og hvør hevur gjørt eftirlitið.

7.4 ÚT- og neyðljós skulu javnan kannast, soleiðis at tey altíð virka.

7.5 Tað skal javnan kannast:

-um sjálvafturlatingarskipanir á hurðum virka.

-um hurðarnar lata heilt aftur í falsin.

-um tær eru tættar.

-um vatn stendur til slanguskápini og

-um tær geva nóg mikið av vatni.

7.6 Brek, manglar ella ólag, ið kemur til sjóndar undir kanningum eftir punktunum 7.1 til 7.5, skulu bøtast og setast í stand beinan vegin.

Desember 1998 Brunaumsjón landsins.